## Tvær eykasýningar av E elski Førjar

Longu í gjár varð útselt til tær tríggjar sýningarnar hjá E elski Førjar, sum verða í Norðurlandahúsinum sunnu- mána- og týskvøldið. Orsakað av tí stóra áhuganum verða tvær eykasýningar. Tær verða mikukvøldið og fríggjakvøldið í næstu viku. Sølan av atgongumerkjum til hesar sýningar byrjar í dag.



## Jazzur á Hvonn

Týskvøldið er jazzur aftur á skránni á Hvonn. Tá spælir bólkurin Trio Magnussar og vinmenn. Trio Magnussar eru Magnus Johannesen á klaver, Rógvi á Rógvu á trummum og Edvard N. Debess á bass, men av tí at hann er burturstaddur hevur trioin fingið Johannes á Rógvu Joensen við ístaðin. Afturat sær hevur trioin fingið nakrar vinmenn ella gestatónleikarar. Teir eru Ólavur Olsen á trompet og Dávur Juul Magnussen á trombone. Teir eru báðir kendir í ymsum høpi, bæði her í Føroyum og uttanlanda. Alt bendir á, at hetta verður eitt sera gott tónleika kvøld. Tónleikurin byrjar kl 21.

# Tað góða veðrið í mai sæst aftur á rættini

**Lembingarveðrið í ár var av tí besta, og tað sæst aftur, nú fjøllini verða gingin**

Á FJALLI
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

Longsti dagur er farin, dagurin er styttur meiri enn ein hálvan tíma, og sambært kalendaranum fer summarið at halla. Seinastu vikurnar hevur verið liggjandi høgætt. Tað man vera hugaligt hjá teimum, sum búgva vestanfyri, meðan tey, sum búgva eystanfyri, munnu halda landnyrðingin hava verið í so drúgvan hesaferð. Seinasta leygardag fingu hesi ein skáa, tí tá fór hann niður í landssynning, og lotið gjørdist lýggjari.

Við Gjógv høvdu tveir av høgunum boðað frá fjallgongu hendan leygardagin. Um morgunin var eisini av besta veðri, klárt upp á hvønn tind, men út á fyrrapartin køvdi hann av í mjørka. Men bara niðri í bygdini. Í erva var klárt og sól, og tá dagurin var liðugur, var lætt at skilja fjallmenninar burturúr av tí eyðkenda reyða litinum, sum sólin hevði givið teimum.

Eins og fjallmenninir vóru væl nøgdir við tað góða veðrið, var røktingarmaðurin í

Líðini, Jákup Matras, væl nøgdur við seyðin. Tað sást eisini í rættini, at tað var væl lambað, og røktingarmaðurin var ikki í iva, hvør orsøkin er til tess.

– Nú var mei ógvuliga góður, so vit høvdu sera gott lembingarveður í ár, og tað sæst aftur á talinum. Hinvegin var nógv høgætt og rættiliga kalt, so tað var ikki tann nógvi gróðurin í fyrstani. Men tað er væl lambað.

### Ikki so galið ár

Tað var 5. juli leygardagin, og Jákup Matras ásannar, at tað er rættiliga tíðliga at fara á fjall. Men eftir umstøðunum er tað ikki ov tíðliga, heldur hann. Seyðurin er hampiliga væl filaður, og nakað hevur kastað, so tað er í lagi at ganga fjøllini nú, heldur hann.

Men hóast tað er væl lambað, og hóast seyðurin er væl fyri, torir røktingarmaðurin í Líðini ella Ytru Líð, sum onkur nevnir hagan, ikki at siga, at árið verður eitt av teimum góðu.

- Tað vísir seg nú, sum at gróður er komin í hagan. Men eg veit ikki. Í Líðini plaga vit at siga, at tey vátu árini plagdu at roynast betur í brøttum haga, og at tey turru árini royndust betur í tí slætta haganum. Men sum tað sær út nú, vænti eg, at tað verður ikki so galið.



*Jákup Matras, røktingarmaður, hyggur seg um í rættini*



*Brøðurnir Eliesar í Pálsstovu og Magni Joensen. Postmaðurin í Klaksvík kann annað enn at skilja brøv*



*...og bankamaðurin Páll Lindi Nólsoy vísti, at hann dugir eisini við saksinum*